Vit hava spurt nøkur fólk, hvat tey hildu verða tað besta í 2010

# TAÐ BESTA Í 2010

## FØROYSK FLØGA




Uni L. Hansen:

### Hanus G. Johansen

*Hørpuspælarin*

2010 fer í søguna sum eitt sterkt ár hvat viðvíkur føroyskum tónleikaútgávum. Yvir 30 fløgur eru útkomnar í ár, og støðið hevur ongantíð verið hægri. Fleiri fløgur eru verdar at framhevja, eitt nú »Let The Dog Drive Home« Hjá Teiti og ikki minst »Fighters They Bleed« hjá SIC, ið báðar eru meistarliga hvør í sínum lagi. Men ein útgáva kagar upp um allar hinar í ár. »Hørpuspælarin« hjá Hanus G. Johansen er ikki bara ársins besta føroyska fløga, men skal teljast millum bestu føroyskum tónleikaútgávur gjøgnum tíðirnar.

Hanus er ein livandi legenda, men hann hevur ongantíð verið betri enn nú, hann aftur syngur Poul F. Orð eru fátøk, og tár siga ofta meira, og tey havi eg felt nógv, meðan eg havi lurtað eftir vøkru sangum Hanusar, ið hann hevur skrivað til flottu og sorgblíðu yrkingarnar hjá Poul F. Joensen.

»Hørpuspælarin« er tónlist, tá hon er allarsterkast. Besta dømi er sangurin »Góða ongantíð fer tú úr huga«.

Útgávan javnviga eisini so ómetaliga væl bæði tað fólksliga og hámentaða, ið annars altíð eru sum olja og vatn á føroyska mentanarpallinum. Annað vil ikki vita av hinum og øvugt. Men tað Hanus G. syngur Poul F., so er tað viðkomandi fyri bæði flakakvinnuna í Klaksvík og lærda bókmentafrøðingin í Tórshavn.

Keypið hesa fløgu.

## ÚTLENDSK FLØGA

Fróði Løkságarð:

### Robert Plant

*Band Of Joy*

Um eg hugsi um tað, sum er komið av útlendskum tónleiki hetta árið, eru fleiri minniligar útgávur, ið renna mær til hugs. Ein er kortini, sum stendur klárari fyri mær enn hinar. Band Of Joy er heitið á seinastu soloútgávuni hjá fyrrverandi Led Zeppelin sangaranum, Robert Plant. Sjálvur haldi eg hesa verða bestu soloútgávuna hja Robert Plant eftir tíðina í Led Zeppelin. Eftir væleydnaða samstarvið við Allison Krauss á T Bone-Burnett framleiddu útgávuni, Raising Sand, sum kom á marknaðin í 2007, var eg ikki sørt spentur eftir at vita, hvørjar kaninir Robert Plant hevði eftir í hattinum.

Á Band Of Joy samstarvar Robert Plant við frálíka guitarleikaran og framleiðaran Buddy Miller. Talan er í stóran mun um útgávu við tøkuløgum, har løg hjá millum annað Los Lobos, Low og Richard Thompson eru at hoyra í nýggjari tulking. Sum tulkari er Robert Plant frálíkur. Hann megnar á ein hátt at geva lurtaranum kensluna av, at hetta er hansara egnu løg. 62 ára gamli sangarin megnar, hóast ýlini frá Led Zeppelin døgunum eru tagnað, framvegis at hugtaka lurtaran. Avgjørt ein av ársins bestu útlendsku útgávum.




## FØR. ÍTRÓTTUR



Uni Holm Johannesen:

### Pál Joensen

*Svimjing*

Nú ítróttarárið 2010 skjótt er farið afturum er spurningurin ikki, hvat var ársins ítróttarbragd. Spurningurin er hinvegin, hvat er størsta føroyska ítróttarbragd nakrantíð. Allan Nielsen, ítróttarskrivari á Politiken, reisti spurningin, tá Pál Joensen svam silvur til Føroya undir evropameistaraheitinum í 1500 metra frí. Pál Joensen hevur verið føroyska ítróttarbrandið seinastu árini. Ongantíð áður hevur nakar føroyingur bjóðað heimsins bestu av, sum vágbingurin hevur.

At hansara avrik ikki stendur langt framman fyri sigurin hjá føroyska landsliðnum á Eysturríki í Landskrona er, at fótbóltur er eitt liðspæl, og svimjing er einstaklingaítróttur.

Eitt annað flott føroyskt ítróttaravrik í 2010 var túrurin um Atlanshavið hjá Livari Nysted og Artemis Investments.

## FØROYSK SANGUR

Malan Eyðunsdóttir:

### Eivør Pálsdóttir

*Vøka*

Besta føroyska lagið í 2010 er Vøka hjá Eivør Pálsdóttir, ið er á fløguni Larva, og sum somuleiðis er einasta lagið á fløguni við føroyskum teksti. Tað eru fleiri ymiskar orsøkir, hví eg haldi, at júst hetta lagið er tað besta. Hetta er eitt lag, ið Eivør sjálv hevur skrivað tekstin til, og lagið hevur hon gjørt saman við Benjamin Petersen. Tað hevur ein dapran dám við nøkrum elektroniskum elementum, ið liggja sum grundarlag undir lagnum, og geva eitt ófrættakent og orkumikið huglag. Ljósa og inniliga røddin hjá Eivør gevur lagnum nakað heilt serstakt saman við tekstinum, ið hevur eksistentiellar og seksuellar undirtónar. Kórarrangementið hjá Tróndi Bogasyni, sum útisetakórið Mpiri syngur, er heilt fantastiskt,



og fær lagið nærum at eksplodera. Hæddarpunktið í lagnum er vokalsoloin hjá Eivør. Hon dugir sum eingin annar at spæla við røddini og geva henni frítt flog, og alt gongur upp eina hægri eind, tá Eivør nærum skriggjar hægstu tónarnar út. Eitt heilt ótrúliga gott lag, sum fer inn undir húðina, og sum eg ongantíð verði troytt av at hoyra.

## FILMUR

Birgir Kruse:

### The Ghost Writer

*Hulduhøvundurin*

At síggja film í almenna rúminum er blivið so avmarkað, at millum teir filmar, sum eg havi sæð til almenna sýning í ár, kann talan bara verða um tríggjar: tveir við Leonardo Di Caprio, 'Inception' og 'Shutter Island', ella ársins filmur hjá Polanski, 'The Ghost Writer'. Eg velji hin seinasta. Orsøkin er, at hetta var ein klassisk og elegant nøtrisøga, ið snýr seg um at skriva fyri onnur, og knappliga verða vundin inn í eina aðra søgu, sum




ein heilt annar hevur pallsett og skrivað. Praktfull søga, sum eg taki til mín og fái nógv burturúr. Og so er henda filmaða søgan ikki so kompleks, sum hinar báðar. Her verður orðafellið 'Hoyr um ein annan, hygg um teg sjálvan' vent á høvdið. Boðskapurin í filmaðu søguni er heldur at læra seg at lesa millum reglurnar. Í hvussu er, um ein vil vera hulduhøvundur.